# E - og tónleikurin



**Bjarni Mohr, útvarpsmaður**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Nei.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Nei.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Nei, men eg plagi at royna at floyta, men tað er nokk so torført við øllum vatninum

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Nei.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Nógv.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Tað er torført at siga. Fyri einum 3-4 árum síðani vóru nakrar 400 fløgur í savninum, men eg havi ikki talt tær síðani.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– »This Is My Trouth, Tell Me Yours« hjá Manic Street Preachers.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– »Greatest Hits« hjá Eilert Pilarm (ein av teimum mongu, sum roynir at liva lívið hjá Elvis umaftur).

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– »På stormfulle hav« hjá Venneslattrioen.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Tað eru fleiri pínligar, men eg kann ikki seta navn á, hvør tann mest pínliga er.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– »Fagra Blóma« hjá Pól F.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Tað veldst um, hvussu lagið er júst ta einstøku løtuna, men Sting plagar at virka.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Creed ella Metallica (HART frá).

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Kvøðuljómaslagararnir.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– »Disco Inferno« hjá The Trammps.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– »Moonlight Shadow« hjá Maggie Reilly/Mike Oldfield.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– »Nærri mín Guð til tín«.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Bjørn Afzelius á Jazzfestivalinum í Norðurlandahúsinum, august í 1990.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– John Williams, sum millum annað hevur gjørt tónleik til »Schindlers List« og »Star Wars«.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Bartal N. Poulsen, Boston, bartal@mit.edu
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Mót ljósari tíðum?

Nú lembingin næstan er byrjað har heima, og páskaliljurnar allarhelst fara at hyggja sær undan fyrsta dagin, liggur Boston enn undir í kava. Í fjør summar, áðrenn leiðin gekk yvir Atlantshavið minnist eg, at eg fekk ávaringar um, at veðrið ikki altíð er av tí besta í Boston, men sum føroyingur tekur man ikki tílíkt so tungt. Vit eru von við lúnafullar veðurgudar, og tað mann ikki vera nógv, ið er verri enn gerandisveður í Føroyum. Men nú eitt ár skjótt er farið, havi eg sanniliga lært, hvat meint var við. At tað vóru 35 hitastig hin dagin eg trein úr flogfarinum er eitt, men hesir síðstu mánaðirnir hava sanniliga sett heimabundnu húgvuna á eina roynd. 20-25 kuldastig hava ikki verið óvanlig, og enn eru vit ikki komin upp um gylta markið millum kulda- og hitastig. Mars mánaði hálvgum lovaði okkum, at nú var tað heilt skjótt, tað lá líkasum í luftini, at við einum sindri av tolsemi fór at vera sloppið, men enn hevur tað so verið ov tíðliga at goymt vetrarklæðini burtur fyri hesuferð.

Eg leitaði mær suðureftir í nakrar dagar nú herfyri... gamaní var tað ikki tann langi teinurin, men tað gjørdi allan munin kortini. New York má vera ein býur í einari ligu fyri seg sjálvan. Lívið í New York hevur altíð gingið sína heilt egnu gongd. Hóast ein hevur hoyrt um og sæð býin óteljandi ferðir í filmum, skilir ein hann ikki, fyrr enn ein hevur upplivað hann; og sjálvt tá eru nógv, ið standa spyrjandi. Longu á veg inn í býin byrjar ein at kenna ymiskt aftur - Brooklyn bridge, háhúsini á Manhattan, Times Square. Men tað, ið situr eftir er ikki, hvussu risastórt alt er, men meira sjálvt lívið, ið dagliga gongur sína gongd í býnum. Manhattan tykist at draga fólk úr øllum ættum, ið liva við adrenalini í blóðinum, og sum stórtrívast í øllum rokinum. Newyorkbúgvar tykjast flyta seg skjótari enn nakað annað fólk á klótini. Ongin leggur fingrarnar ímillum, øll hava eina meining um alt, og øll mugu tey royna at klára seg sum frægast millum hinar 8 milliónirnar.

Men hóast New York býur og hansara innføddu eftir øllum at døma seta eina æru í ikki at lata seg ávirka av nøkrum uttanifrá, so sluppu vit heldur ikki heilt undan krígnum her. At síggja alvápnaðar hermenn og politistar við skarptløddum riflum á øðrum hvørjum gøtuhorni var satt at siga eitt sindur ræðandi. Trygdartiltøk kann eg venja meg við, at tøma lummarnar fyri smápening hvørja ferð eg skal inn á eitt bókasavn ella eina stjórnarskrivstovu fyri at sleppa undan "BIIP BIIP BIIP" verður skjótt gerandiskostur, men alvápnaðar menn í gøtunum trúgvi eg neyvan eg nakrantíð fari at ganga framvið uttan at blunka. Hóast kríggið er veruleiki, tykist tað innast inni at vera ein veruleiki, ið onkur annar hevur at dragast við. Tað eigur líkasum ikki at nerva gerandisdagin her yviri stórvegis, men trygdartiltøkini siga nakað annað.

Lungnasjúkan SARS hevur eisini givið amerikumonnum okkurt annað at hugsa um í hesum krígstíðum. Í fjølmiðlunum megnar hon meira enn so at stjala nøkur sekund her og ein minutt har frá frásagnunum úr Irak. Higartil eru yvir 100 "møguligir" tilburðir staðfestir í USA, og í Boston eru 6 fólk vorðin sjúk. Hóast sagt verður, at vandin fyri at vera smittaður er ovurhonds lítil, eru serliga kinesisku økini í stórbýunum í USA, "Chinatown", farin at merkja avleiðingarnar av sjúkuni. Ikki so, at fólk eru farin at leggjast sjúk í stórum tali, men ymsar leysasøgur hava gingið um at fleiri tilburðir eru staðfestir í Chinatown í Boston og í New York, og hetta ávirkar handilslívið. Hesi økini, har kinesarar og onnur fólk úr landssynningsásiu búleikast, hava eitt heldur sermerkt handilslív, ið møguliga minnir um heimlondini í Asia. Nógvar mat-stovur, gøtusølumenn á gongubreytunum, og uttanduramarknaðir við alskyns vøru, grønmeti, fiski, og flogfenaði, geva eitt serliga dynamiskt umhvørvi, og hetta hevur eisini gjørt økini til stór ferðavinnuøki. Nú óttin fyri SARS eisini er farin at gera um seg her í ávísan mun hevur vinnan í Chinatown fingið eitt skot fyri bógvin. Apotekini hava úr at gera við at selja maskur og ymiskar vørur at styrkja immunverjuna, men flest aðrir handlar í økinum liggja tómir. Fólk, ið búgva í økinum halda seg við hús, og tey, ið búgva uttanfyri halda seg burtur og eru farin aðrastaðni at eta og at keypa inn. Tað tykist, sum hevur longdi veturin fingið ein symbolskan týdning. Nú fara vit skjótt at ótolnast eftir ljósari tíðum, bæði so og so.



O&K Heilsøla & Maskinur

TILBOÐ
í viku 15-16
ALLAR LEIKUR
-15%

Annars hava vit eisini:
Amboð - Ellutir - Termo Ketildraktir
Sjónvarp - Video - Ymiskar lampur

Skógvar -30% (ikki trygdarskógvar)

STØKK INN Á GÓLVIÐ
OG SÍGGJ OKKARA STÓR ÚRVAL

O.K. HEILSØLA & MASKINUR
FO-430 Hvalvík
Handilin á Kajuni

PÁSKA ÚTSØLAN
hjá Berg Motors er byrjað
Nøkur dømi

MAZDA 323 – fyrr 162.700 – AVSLÁTTUR 20.000 – Prísur nú 142.700,-
MAZDA MPV – 7 persónar – fyrr 254.700 – AVSLÁTTUR 25.000 – Prísur nú 229.700,-
MAZDA 626 – Diesel – fyrr 235.700 – AVSLÁTTUR 20.000 – Prísur nú 215.700,-
MAZDA B2500 – 4x4 Diesel v/ baksetur – fyrr 281.700 – AVSLÁTTUR 30.000 – Prísur nú 251.700,-
MAZDA 323 – GLX 1,6 v/ aircon. – fyrr 201.700 – AVSLÁTTUR 25.000 – Prísur nú 176.700,-
MAZDA PREMACY – LX Diesel – fyrr 218.700 – AVSLÁTTUR 35.000 – Prísur nú 183.700,-

Annars verða allir nýggir Mazda bilar seldir við kr. 10.000 í avsláttri til páskar

Páskaútsølan hjá Berg Motors fevnir eisini um brúktar bilar Avsláttur upp til 30.000,-

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

## Vegna útlendskar seljarar, hava vit hesar hekkutrolarar til sølu

FST 323
Slag : Frystitrolari
Bygdur : 1988 í Danmark
Klassi : DNV +1A1 , 1B
Tonnaga : BT 209 NT 62
Stødd : 23.9 m loa x 7.14 m br.
Hv.maskina : 850 HK Man B& W
Trolspøl : 2 x 12 tons
Lastarúmd : 90 cbm

FST 324
Slag : Frystitrolari
Bygdur : 1988 í Danmark
Klassi : DNV +1A1 , 1B
Tonnaga : 120 BT
Stødd : 22.21m loa x 7.20 m br
Hv.maskina : 875 Caterpillar
Trolspøl : 2 x 12 tons
Lastarúmd : 50 cbm

Skipini eru í sera góðum standi.

FST 332
Slag : Frystitrolari
Bygdur : 1988, Noregi
Klassi : DNV + 1A1
Tonnaga : BT 631 NT 189
Stødd : 38.45 m loa x 9.60 m br. x 4.43 d
Hv.maskina : Wartsila Vasa 1320 HK
Trolspøl : 2 x 19 ts Brattvåg

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til :

TOR SHIPPING
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 85 31 · Fax. 31 93 69 · e-mail: torship@post.olivant.fo
www.torship.fo

*Vit hava annars stórt úrval av skipum til sølu.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Byggi og býarskipanardeildin**

Byggi- og býarskipanardeildin er partur av teknisku fyrisitingini. Á deildini starvast 13 fólk.

Arbeiðsøkini eru í høvuðsheitum:
· planlegging
· lendisumsiting
· byggimál
· húsaumsiting

Vit bjóða eitt áhugavert starv við búningarmøguleikum og góðum arbeiðsviðurskiftum.

Byggi- og býarskipanardeildin er í gamla posthúsinum í Havn, í sama bygningi sum Snarskivan og Tekniska deild.

www.torshavn.fo

## Býararkitektur

Tórshavnar kommuna søkir eftir býararkitekti at byrja skjótast til ber. Býararkitekturin er, við tilvísing til tekniska stjóran, leiðari fyri byggi- og býarskipanardeildini,

**Høvuðsuppgávurnar**
hjá býararkitektinum eru m.a. at:
· leiða og skipa arbeiðið á deildini
· ganga á odda við planlegging í síni heild
· luttaka í fíggjarætlanararbeiði og ansa eftir at játtanir verða fylgdar
· veita serkøna hjálp og samskifta við nevndir, viðskiftafólk, stovnar og fyritøkur
· vera skrivari hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið roknar við at umsøkjarin**
· hevur hugflog og skapandi gávur, við atliti til at menna býin
· hevur kunnleika til økið og er útbúgvin arkitektur
· gongur á odda, er sjónligur, opin og motiverandi
· dugir væl at fyrisita og samskifta bæði innan- og uttanhýsis
· hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og til reiðar at taka avgerðir
· er positivur og dugir væl við starvsfólki

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Arkitektafelagið, við ískoyti á 17. stigi. Setanin verður við tvey ára royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. apríl 2003 kl. 13:00. Viðmerk á brævbjálvan "Býararkitektur".